ROVER 40 ÁR

Magnus Gunnarsson

Land Rover í Onglandi hátíðarhalda í hesum døgum, at Range Rover fylla 40 ár.

Range Rover kom fyrstu ferð á marknaðin í 1970, sum ein luksusútgáva av Land Rover.

Í sambandi við 40 ára haldið hevur núverandi Range Rover fingið eina sonevnda facelift og fæst í eini dieselútgávu við 313 hk og einum snúningsmomenti upp á ikki minni enn 700 Nm. Eisini verður ein heilt nýggjur Range Rover Evogue sýndur fram. Bilurin verður serliga gjørdur til amerikanska marknaðin.

Hóast Land Rover og Range Rover verða framleiddir í Onglandi, er tað Tata Motors í India, sum eigur verksmiðjuna.

maggi@sosialurin.fo

Fyrsti Range Rover frá 1970

Frá sjónvarps-verti til elbilar

Danski sjónvarpsverturin Ann Marker frá DR2 er sett sum samskiftisstjóri hjá elbilafyritøkuni ChoosEV.

Ann Marker er kend frá sínum starvi sum sjónvarpsvertur á vísundasendingini "Viden Om" á DR2.

Nú verður tað, sum hon sigur "Viden om elbiler" hon skal formidla hjá ChoosEV, fyri at fáa danir at velja umhvørvisligu bestu loysnina innan bilar.

Áðrenn Ann Marker fekk starv sum vísundajournalistur hjá DR2, arbeiddi hon eitt tíðarskeið sum meteorologur hjá DR1.

Eftir at hava arbeitt átta góð ár hjá DR, er tíðin búgvin hjá mær at royna nakað nýtt. Her kann eg røkja mín áhuga fyri umhvørvinum, samstundis sum eg eri við at byggja eina heilt nýggja vinnu upp, sigur Ann Marker, sum er 38 ára gomul og útbúgvin cand. scient.

ChoosEV er ein donsk elbilafyritøka. Eigarar av fyritøkuni eru Syd Energi, Seas-NVE og Sixt Danmark. Málið hjá ChoosEV er at vera leiðandi á danska marknaðinum innan infrastruktur og elbilar.

mg

Ann Marker er kend frá sínum starvi sum sjónvarpsvertur á DR2

Ann Marker er sett sum samskiftisstjóri hjá elbilafyritøkuni ChoosEV